gult cyan magenta svart



# TILTØK

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Johan Thomasen.
Innsavnan verður til húsið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Porkeri**
Fundarøðin hjá Svenning av Lofti heldur fram í kvøld kl. 20 og sunnudagin kl. 18.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Magnus Jensen.
Mánakvøldið kl. 20 heimaforbundið.

**Frá Felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði kl. 14.00 í Jákupsstovu, J. Patursonargøta 24, 100 Tórshavn.
Nærri fæst at vita hjá Annvør Nielsen tlf. 317261, Helle Johansen tlf. 317940 ella Sólgerð Foldbo tlf. 422184.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

**VBA-fundir**
Fundur fyri vaksin børn hjá alkoholikarum/ella ørkymlandi familjuviðurskiftum, eru hvørt leygarkvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17 (opin fundur).
Fundirnir eru á Vaskarínum, Tórsgøta 5.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Leygardagin: kl. 17-18.
Sunnudagin: kl. 11-12.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn**
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

**Vágs Matmøðrafelag**
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 5.2.*
Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresufelagsskapin
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til døgurðan og túrin mikudagin, tlf. 316491
*Týsdagin 6.2.*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Hvør kennir? Gamlar myndir frá myndasavninum í Hoyvík
*Mikudagin 7.2.*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði (tilm. mánadag tlf. 316491)
kl. 14.30 Framsýning. Passiutónar. Trúarlig tema í norðurlendskari list. Listasavn Føroya
*Hósdagin 8.2.*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát um skanning, brenning, printing og nýtslu av alnótini verður á 1. hædd, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 9.2.*
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geils-gøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14.00 til 20.00 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupost-ur lisa@lisa.fo – heima-síða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International**
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiski-menn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Nor-egi. Lima-gjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Føroya Astma/Allergifelag**
Postadressa MBF-húsið, Ís-landsvegur 10c.
Felagið hevur Tlf./fax 311419.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail:
ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skriv-stovu-tíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Rand-fríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**MBF-skrivstovan**
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail:
mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin gerandisdagar kl. 8.30-16.00.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupost-adr. deaf_fo@-post.-olivant.fo

**Nærvarpið LUMI radio í Aalborg**
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10.

**Evangeliska Røddin**
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Føroyska nærvarpið í Esbjerg**
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11 og verður endursend kl. 16.

**Føroysk møti**
Føroysk møti eru triðja leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroyska arbeiðið í Eliaskirkjuni**
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Ras-mussen, tlf. 32 969995, ella Øssuri Kjølbro, tlf. 36 77 38 20.

**Føroysku gudstænasturnar**
í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14.00. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

**Kristnastova**
Birmavej 36, København S, tlf. 32 55 18 09
fax. 32 58 61 49
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20.
Møti við breyðbróting er hvønn sunnu-morgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis.
Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

**Møtiskrá**
hjá føroyska trúboðaranum Hera Elttør.
1.2. í Kølkjær IM, 2.2. í Videbæk, 5.2. í Vildbjerg, 8.2. í Øster Agger, 9.2. í Vejrum, 11.2. í Føroyingahúsinum í Århus, 16-18.2. í Sønderborg.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag:
Kl. 11: Breyðbróting.
Kl. 18: Evangeliskur fund--ur.
Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg,
tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

**Føroyskt barnamøti**
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Heimamissiónin**
Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felags-skap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

**Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Sørin Danielsen, tlf. 56147684 ella Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

**Føroyingafelagið í Reykjavík**
Ølduslóð 27
220 Hafnafjørður, Ísland
Tlf. 565 4883
E-mail: forrek@visir.is

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
Opið er: Mána-dag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14.00-18.00, fríggjadag stongt (donsk tíð).

**Føroyingar í Noregi**
E-mail:
foroyar@norden.no
Heimasíða:http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við til-knýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

# EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Fimta boð: Tú mást ikki sláa íhel.*

Hetta boð er kanska tað, sum vit ongantíð koma at bróta, kunnu vit halda. Tað liggur okkum fjart at taka lívið av nøkrum menniskja. Vit hava ikki deyðarevsing, vit eru friðarfólk og fara ikki í kríggj. Vit hava virðing fyri lívinum sum heild, og er helst kristna ávirkanin á okkara samfelagsskipan viðvirkandi til, at so er. Men vit mugu við sorg ásanna, at mangar eisini kristnar tjóðir berjast móti hvørji aðrari og sínámillum við nógvum mannfalli um spurningar og trætur, sum áttu at verið loystar á friðarligan hátt.

Tú mást ikki drepa, stendur í aðrari umseting. Men vit drepa jú ikki, hava vit so fyri neyðini at fáa eitt slíkt boð og harða áminning. Jóhannes apostul sigur, at hvør tann, sum hatar bróður sín, er manndrápari. Ósemjur og stríð millum systkin, grannar, fólk og tjóðir kann vekja so sterkar kenslur, ja beinleiðis hatur, sum kann fáa slíkt vald á sinnalagnum, at tað elvir til meira illstøðu og harðskap við syndarligum fylgjum, ja enntá til dráp, um illa vil til.

Klandur er av tí illa og oyðileggur so ómetaliga nógv. Lívið verður tyngri at liva, har klandur vald- ar í bygdini ella innan familjuna. Tí er so umráðandi hjá okkum ikki at vera orsøk til, at klandur íbirtist, men heldur leggja okkum orðini í geyma um at fyrigeva, hevur órættur verið okkum fyri, og fremja kærleika í verki og vera við tí góða orðinum, so niðurbrótandi slatur ikki sleppur víðari av okkara ávum, og kyknandi hatur kann verða køvt í byrjanini.

Lívið er okkum givið, vit hava ikki loyvi til at týna lív, heldur ikki tað ófødda í móðurlívi, sum tíverri eisini nógvar kristnar tjóðir eru farnar undir. Hjá summum kann lívið viðhvørt tykjast so tungt, at tey orka tað ikki longur. Eru vit varug við hetta, eiga vit at veita ta hjálp, vit kunnu, so viðkomandi fær lívsmótið aftur. Er kærleikin til Guds og næstan drívmegin í lívi okkara, tá verður lívið lættari at liva, og tá verður hetta boð eisini lættari at halda.

Hvat var Guds jørð eitt fagnarstað
at búgva á, tá bróðurlag
var hvørt eitt stað at finna;
og klandur innivist ei fekk,
men fjónað millum húsa gekk
og einki fekk útinnað.

*Meistari, hvat gott skal eg gera, at eg kann fáa ævigt lív? Jesus segði: Vilt tú koma inn til lívið, tá halt boðini. (Matt. 19,16-17).*

**Sigvald Kristiansen**




# THE KEMPLER INSTITUTE OF SCANDINAVIA A/S

Miðdepil fyri familjuterapi og eftirútbúgving

Kempler-Instituttið í Danmark er ein miðdepil fyri familjuterapi og eftirútbúgving og hevur ígjøgnum fleiri ár skipað fyri eini tvørfakligari supervisorútbúgving.
Undirritaðu hava gjørt avtalu við instituttið um at fáa eina tílíka útbúgving til Føroya:

**1-ÁRA SUPERVISOR-ÚTBÚGVING**
– tvørfaklig eftirútbúgving í Føroyum v. spesiallæknakonsulenti Mogens A. Lund og sosialráðgeva Marionnu Reenberg

Útbúgvingin er skipað sum dagskeið og er ætlað fakfólki innan undirvísingar-, almanna- og heilsamálaøki, íð hava áhuga fyri og høvi at nýta supervisjón ella »kollegialan respons« í sínum fakliga gerandisdegi.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Tíðir: | týs–hós | 4. - 6. sept 2001: | **Grundskeið** |
| | - | 30. okt–1. nov 2001 | |
| | - | 19.–21. febr 2002 | |
| | - | 9.–11. apríl 2002 | |
| | - | 11. –13. juni 2002 | |
| | - | 20. –22. aug 2002 | |

Stað: MBF-húsið, Tórshavn
Kostnaður: 20.000 kr

Fyri luttakarar, sum áður hava tikið eina eftirútbúgving hjá Kempler Instituttinum er ikki neyðugt at taka grundskeiðið. Tá verður kostnaðurin bert 15.000,- kr.
Tilmeldingarfreist : **1. apríl 2001**

Informatión, tilfar og tilmeldingarblað er at fáa hjá:
Birgit Debess
Tlf. 31 84 03 eftir kl. 17
T-post: birgit@torshavn.fo
Ernu Hákonardóttir
Tlf. 31 68 96 eftir kl. 18

# SKEMT 2000

**fæst í sølubúðunum kring alt landið**
**Kostnaður 120,-**




**Enn er møguleiki fyri at ogna sær allar 12 SKEMT bøkurnar í signeraðum eintøkum fyri ein samlaðan prís á einans kr. 650,-**

**Bíleggið nú og tit fáa tær sendandi beinanvegin. Ringið til Sosialin á tlf. 31 18 20**

Sosialurin - 311820



# NLP Skeið
## og fyrilestur

***Tíðslinjuskeið:*** **»Skapa tað lív tú ynskir tær«**
Skeiðið snýr seg um framtíð tína, og hvussu tú nær málini, tú setur tær.
Á skeiðnum verður m.a. arbeitt við:
- *Hvussu tú fært eina betri fatan av tær sjálvum og tí, sum er rætt fyri teg*
- *Hvussu tú loysir upp negativar kenslur*
- *Hvussu tú broytir forðingar til møguleikar*
- *Hvussu tú finnur tað, ið veruliga hevur týdning fyri teg, og hvussu tú nýtir hetta at seta tær mál í framtíðini*

Tíðarskeið: 30., 31. mars og 1. apríl 2001 – fríggjadag kl.15–20, leygard. kl.10–18 og sunnud. kl.10–17
Stað: Føroya Arbeiðarafelag, Tjarnardeild 5, Tórshavn
Kostnaður: kr. 1700,- íroknað skeiðtilfar og ábit. *Hevur tú verið á tíðslinjuskeið áður, fær tú kr. 500 í avsláttri.*

***Einasamrøður:*** Jack Makani fer at hava einasamrøður, *tilmelding neyðug.*

***Fyrilestur:*** »Gagnnýt fjaldu styrki tína – lær NLP«. Ein og hvør kann fáa gleði av hesum fyrilestri, tær nýtist ikki at hava forkunnleika til NLP. *(Ókeypis atgongd, tilmelding ikki neyðug).*
Tíð: 29. mars 2001
Staður: Verkstaðið Vón, Hóvbrekka 1, Argir

Skeiðleiðari og fyrilestrarhaldari: Jack Makani (dani), NLP- venjari.
Tilmelding til skeiðið og upplýsingar: Hjá Dianu Borgnýardóttir á **tlf. 441060 - 222280** ella á teldupostadressu: dkonsult@post.olivant.fo.
Sí annars heimasíðu: www.nlp-huset.dk

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Ford Sierra 2,0 – 4 hurðar
**Árg.:** 1991
**KM.:** 98.421
**Eyka útgerð:** 15” alu-felgur

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú. Kann síggjast á bilverkstaðnum hjá Mogens Petersen, 826 Trongisvágur.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Tlf. 373890
fax nr. 373117

# HAVNAR BIO




Leygardagin 03.02. kl. 21[00]
Leygardagin 03.02. kl. 23[30]
Sunnudagin 04.02. kl. 20[00]
Sunnudagin 04.02. kl. 22[30]




Leygardagin 03.02. kl. 18[00]
Sunnudagin 04.02. kl. 18[00]




Leygardagin 03.02. kl. 22[30]
Sunnudagin 04.02. kl. 22[00]




Leygardagin 03.02. kl. 20[00]
Sunnudagin 04.02. kl. 19[30]

**KOMANDI FILMAR**




**Frumsýning Fríggjadagin 09.02.**




**Frumsýning Fríggjadagin 09.02.**

**www.in.fo/havnarbio**